Álit

í

løgtingsmál nr. 1/2020: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um val til allar føroyskar kommunur og í løgtingslóg um val til Løgtingið

Landsstýrismaðurin í umhvørvis- og vinnumálum hevur lagt málið fram tann 4. august 2020, og eftir 1. viðgerð tann 1. september 2020 er tað beint Rættarnevndini.

Nevndin hevur viðgjørt málið á fundi tann 9. september 2020.

Nevndin tekur undir við uppskotinum og er harumframt av teirri fatan, at eisini Stýrisskipanarlógin átti at verið broytt við tí endamáli at geva sama málbólki valrætt til Løgtingið.

Við hesi viðmerking tekur ein samd nevnd undir við málinum og mælir Løgtinginum til at samtykkja uppskotið.

Rættarnevndin, 9. september 2020

Christian Andreasen formaður	Ingilín Didriksen Strøm næstformaður	Frimodt Rasmussen
Erhard Joensen	Steffan Klein Poulsen	Sirið Stenberg
	Hervør Pálsdóttir	